# Rás 2 fær einki lurtaragjald



**Óli Holm hevur ongar ætlanir um at lata Rás 2 fáa bita av lurtaragjaldinum hjá føroyingum, sum í løtuni fer til Útvarp Føroya**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*

– Tað er ikki við lóg álagt Rás 2 at røkja nakrar ávísar skyldur, og tí havi eg ongar ætlanir um at lata Rás 2 ella aðra privata útvarpsstøð fáa part av lurtaragjaldinum.

Hetta svar gav Óli Holm, landsstýrismaður, upp á skrivligan fyrispurning, sum Jógvan á Lakjuni, tingmaður, hevði sett honum.

Óli Holm helt, at tað var gott við útvarpsstøðum afturat Útvarpi Føroya, men ÚF er í eini serligar støðu sum public-service rás. Útvarp Føroya hevur fingið álagt at røkja nakrar skyldur, og tí skal ÚF eisini hava lurtaragjaldið til sítt virksemi.

**Gev Rás 2 ein part**

Jógvan á Lakjuni vísti í sínum fyrispurningi á, at Rás eftir hálvumøðrum ári er vorðið fólksins útvarp, og at rásin eisini røkir public-service uppgávur, sum hava stóran týdning.

Tí helt tingmaðurin fyri Fólkaflokkin, at tað Rás 2 kundi fingið eitt part av lurtaragjaldinum, sum føroyingar í løtuni gjalda til Útvarp Føroya.

Jógvan á Lakjuni nevndi, at Rás 2 kundi fingið eini 15 prosent av lurtaragjaldinum, men hetta uppskotið fekk ikki undirtøku í Mentamálastýrinum, har landsstýrismaðurin ongar ætlanir hevur um at taka ein part av lurtaragjaldinum frá Útvarpinum.

**Broyta kringvarpslógina**

Kjakið á tingfundinum mikudagin gjørdist drúgt, og nógvir tingmenn luttóku. Nógv varð tosað um, at Útvarp Føroya sum public-service rás eisini kappaðist við Rás 2 á lýsingamarknaðinum.

Fleiri tingmenn hildu, at Útvarpið skuldi ikki hava loyvi til hetta, um ÚF samstundis skuldu fáa lurtaragjaldið.

Óli Holm, landsstýrismaður, helt, at fyrispurningurin hjá Jógvani á Lakjuni var áhugaverdur og viðgjørdi nógv prinsipiell viðurskifti. Landsstýrismaðurin ætlar í heyst at koma við uppskoti til broytingar í kringvarpslógini, og tá helt hann, at tað fór at verða gott høvi at kjakast um hesi viðurskifti.




# Framleiða nú lidna vøru í Danmark

**Faroe Salmon er nú farið undir framleiðsluna av lidnari laksavøru á virki í Danmark**

Faroe Salmon í Klaksvík, sum hevur keypt seg inn í danska felagið Vendsyssel Denmark, og samstarvið er nú farið í gongd.

Interseafood skrivar, at klaksvíkingar ætla at framleiða um 1000 tons av síni laksaframleiðslu, sum liggur oman fyri 8000 tons, á virkinum í Danmark.

Faroe Salmon keypti her fyri helvtina av partapeninginum í Vendsyssel Danmark, men felagið hevur fingið meirilutan í nevndini.

– Tað gevur ein meira støðugan prís at framleiða lidna vøru úr laksinum, sigur Heini Gregersen, sum saman við Jón Purkhús eigur Faroe Salmon, við Interseafood.

– Framleiðslan á Vendsyssel er ein luksusframleiðsla, og tí er ikki so hørð kapping um ta framleiðsluna, sigur hann.

Faroe Salmon er í løtuni í holt við at byggja nýtt kryvjivirki í Klaksvík.

**ek**

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 26. oktober til hósdagin 1. november

## Breytin - ferðslusending




*Ferðslusendingin hjá Rás 2 er nú aftur á skránni.*

*Breytin hevur ligið still í nakrar vikur, men í samráð við Ráðið fyri Ferðslutrygd er avrátt, at ferðslan verður umrødd á Rás 2 hvønn fríggjadag millum klokkan 15.15 og 16.00 í samstarvi við øll, sum varða av ferðsluni. Og tað eru vit øll.*

*Ferðslan verður umrødd so at siga eftir sama leisti sum higartil, men sendingin varir nú í trý korter í staðin fyri ein tíma.*

*Ferðslusendingin á Rás 2 verður endursend leygardag.*

*Vertur er Sonne Smith.*

## Gesturin

*Vibeke Larsen. Fyrsti kvinnuligi ríkisumboðsmaðurin í Føroyum hevur takkað fyri seg eftir sløk sjey ár í starvinum. Hon verður nú statsamtmaður í Danmark. Seinna partin av tíðarskeiði hennara í Føroyum hevur sjálvur ríkisfelagsskapurin staðið uppá spæl. "Hetta hevur verið ein rættuliga strævin, men samstundis sera spennandi tíð", sigur Vibeke Larsen í opinskáraði samrøðu við Leiv Hansen, har hon eisini viðgongur, at hon ofta hevur kent seg ógvuliga einsamalla og at hon hevur havt mangar svøvnleysar nætur. Vibeke Lasen væntar, at Føroyar og Danmark framvegis eru í ríkjasambandi um 10 ár, "tó undir heilt øðrvísi karmum enn nú", sum hon tekur til.*

*Lagt til rættis: Leivur Hansen.*




## Fres




## Rangt og rætt 2:8




## Metro - farligere end politiet tillader




## Okkara matstovur

